


*- Vit høvdu verið ein langan og keðiligan túr kring Evropa. Men so komu vit til Føroya, og eg upplivdi á fyrsta sinni so blíðar og heitar evropearar. Ja, tað var næstan sum at vera aftur í Afrika*

*- Stóri trupulleikin var, at vit alt ov ofta fingu ymsar upplýsingar frá ymsum instansum í almennu fyrisitingini. Løgreglan segði okkurt, Løgmálaráðið segði okkurt annað, og danska Útlendingastýrið segði okkurt triðja*

# Ilda gjørdist s

- Undirlutakenslan, sum ein borgari úr triðja heiminum hevur, hvarv, tá eg kom til Føroya, og fyri fyrstu ferð nakrantíð gjørdist eg stolt av at vera afrikanari. Tað sigur 22 ára gamla Ilda Lómstein frá vesturafrikanska oyggjabólkinum Kap Verde, sum hevur búð í Føroyum seinastu tvey árini



ÚTLENDINGURIN
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Hóast tað ikki hoyrist á framúrskarandi føroyska máli hennara, hevur 22 ára gamla Ester Ilda Veiga Monteiro, ella Ilda Lómstein, sum hon í dag nevnist, bert búð í Føroyum í tvey ár. Eksotiski oyggjabólkurin Kap Verde á afrikansku vesturstrondini er upprunaliga heim hennara, men í 2003 valdi hon at skifta heim sítt vestanfyri Senegal út við kaldaru breiddarstigini í Norðuratlantshavi.

### Logos II

Eftir lokið studentsprógv og eitt ár á universtitetinum á Kap Verde, har hon las enskt mál, fór Ilda sum 18 ára gomul umborð á trúboðaraskipið Logos II, og í juni í 2001 vitjaði skipið í Føroyum. Ilda var umborð, og hon greiðir frá, at hon var bergtikin av smáu oyggjunum í Norðuratlantshavi.

- Vit høvdu verið ein langan og keðiligan túr kring Evropa. Áhugin fyri skipinum var lítil, og móttøkurnar vóru kaldar. Men so komu vit til Føroya, og eg upplivdi á fyrsta sinni so blíðar og heitar evropearar. Ja, tað var næstan sum at vera aftur í Afrika, greiðir Ilda flennandi frá.

22 ára gamla Ilda sigur, at hon beinanvegin gjørdist tilvitað um líkleikan millum oyggjabólkarnar báðar Kap Verde og Føroyar. Hon sigur, at Føroyar á ein ella annan hátt skiltu seg frá evropeisku londunum, hon hevði upplivað tíðina frammanundan.

- Føroyar og føroyingar mintu meg í ein mun um afrikanska heim mítt. Bæði Føroyar og Kap Verde eru isoleraðir oyggjabólkar, og møguliga skapar hetta ein líkleika millum fólkasløgini. Lyndið, eg upplivdi í Føroyum, var ikki fremmant fyri mær, minnist Ilda aftur.

Og áðrenn undirritaði fær tíð at spyrja, fer smílandi og fyrikomandi afrikanska kvinnan at greiða frá hendingini, tá hon á fyrsta sinni hitti komandi mann sín. Hendingin, sum gjørdi, at Føroyar gjørdust hennara nýggja heim.

Hon arbeiddi sum servitrisa á kafeteriuni umborð á skipinum, og eitt kvøldið var kafeterian hjá Ildu fylt við tónum frá føroyskum tónleikarum. Millum tónleikararnar sat ein bassistur við navninum Rúni Lómstein.

- Hetta var fyrstu ferð, eg hitti Rúna, og tá skipið fór úr Føroyum aftur, hildu vit sambandið við líka gjøgnum telefon og teldupost. Hann kom at vitja meg seinni um heystið í London, síðani hittust vit bæði í Týsklandi og Portugal, og á sumri í 2003 giftust vit á Kap Verde, greiðir Ilda frá.

Eftir brúdleypið á Kap Verde fluttu tey bæði til Føroya, og hon sigur, at fyribils ætla tey sær at vera verandi í Føroyum. Maðurin gongur á læraraskúla í Havn og fær eftir ætlan prógv um tvey ár, og sjálv hevur hon fast starv í svimjihøllini í Tórshavn.

Í næsta mánaða fer Ilda undir fjarlestur í enskum máli á universitetinum í London, og við tað at hon hevur fingið góðskrivað eitt ár frá universitetinum í heimlandinum, kann hon halda fram á øðrum ári sum fjarlesandi á London University. Tey hava keypt sær eini lítil hús í Kollafirði, og í frítíðini verður partur av tíðini nýttur í Lívdini, nýggju brøðrasamkomuni í Tórshavn.

- Sum fremmand hevur Lívdin havt stóran týdning fyri mítt sosiala lív í Føroyum, slær Ilda fast.

### Sløvir myndugleikar

Komin til Føroya fór Ilda saman við manninum í holt við gongdina at ogna sær neyðugu pappírini. Men at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi var lættari sagt enn gjørt. Ilda minnist aftur, at ein stórur partur av árinum fór við einum drúgvum stríði við myndugleikarnar.

- Stóri trupulleikin var, at vit alt ov ofta fingu ymsar upplýsingar frá ymsum instansum í almennu fyrisitingini. Løgreglan segði okkurt, Løgmálaráðið segði okkurt annað, danska Útlendingastýrið segði okkurt triðja, og tí vóru vit heilt ørkymlað, minnist Ilda aftur. Hon leggur afturat, at við dyggari hjálp frá løgfrøðinginum Lindu Hesselberg eydnaðist teimum at fáa neyðugu pappírini. Men stóra løtan á Útlendingastýrinum í Danmark minnist Ilda aftur við einum smíli á varrunum.

- Eg gav teimum mítt pass, og við sínum kúlupenni skrivaði ein ella onnur tilvildarlig kona orðini "+ Faroe Islands" afturat mínum afrikanska nationaliteti. Tað var á ein ella annan hátt so komiskt, at tvey orð við einum kúlupenni í passið var tað einasta, sum kravdist, eftir eitt so langt stríð